# Nýggj farleið til Stokkholm byrjað

**Tað var í besta veðri, at flogfarið hjá Atlantsflogi lendi á sínum fyrsta vanliga rututúri úr Vágum til Stokkholm tíðliga hósdagin. Og nógv varð gjørt burtur úr á flogvøllinum, har ráðharri og umboð fyri Arlandaflogvøllin tóku ímóti ikki færri enn trimum landsstýrisfólkum, umboðum fyri Atlantsflog, ferðafólki og innbodnum**

GREINASAVN
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*
*Myndir: Jan Müller*




*Trý landsstýrisfólk vórðu við á fyrsta rututúrinum til Stokkhólm, Karsten Hansen, Bjørt Samuelsen og Høgni Hoydal. Her saman við stjóranum í Atlantsflogi, Magna Arge*




*Magni Arge, stjóri og Eivør Pálsdóttir frammanfyri ristastóru brandingmyndina av Mykinesi og við tekstinum frá National Geografic*



*Svenski samstarvsráðharrin í norðurlandamálum, Christina Husmark Pehrsson her saman við Høgna Hoydal, uttanríkisráðharra á samkomuni í Arlanda floghavnini*



*Eivør Pálsdóttir og Christina Pehrsson ráðharri*

Farleiðin til Svøríki er ein nýggj roynd hjá føroyska flogfelagnum at røkka longur út. Við hesi farleiðini flýgur Atlantsflog uppá øll Norðurlond við undantaki av Finlandi.

Á samkomu í Arlanda beyð svenski samstarvsráðharrin í norðurlandamálum Christina Pehrsson føroyska flogfelagnum hjartaliga vælkomin til Svøríki. Hon ivaðist ikki í, at hetta fór at verða eitt sera kærkomið tiltak fyri bæði føroyingar og sviar.

Hon segði, at føroyingar skulu vera so hjartaliga vælkomnir at vitja hennara vakra land, og hon var vís í, at sviar fóru at taka undir við hesum nýggja møguleika og vitja tað vakra oyggjalandið Føroyar.

Eisini Høgni Hoydal, landsstýrismaður helt røðu og hann helt fyri, at hetta var ein nógv tiltrongd farleið bæði fyri føroyingar og sviar. Hann metti, at Svøríki og sviar hava so nógv gott at bjóða føroyingum, at tað er í tøkum tíma, at Atlantsflog fer undir hesa nýggju farleið.

Eisini Magni Arge, stjóri hevði orðið og seg seg vóna, at nýggja farleiðin fer at gagna báðum londunum. Sum nakað heilt serligt sang Eivør Pálsdóttir nakrar sangir.

Hini landsstýrisfólkini á ferðini vóru Bjørt Samuelsen, vinnumálaráðharri og Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri.

Flogið verður tvær reisir um vikuna umvegis Stavanger, hósdag og sunnudag.

Lesið meira í Sosialinum komandi vikuna. Eisini Rás2 fer at hava frásagnir og samrøður frá hesi fyrstu ferðini til Svøríki komandi dagarnar. Sí somuleiðis stóra myndarøð frá fyrsta túrinum á Portalinum.

**Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna:**

## Stokkhólmsleið við møguleikum

Atlantsflog hevur lagt enn eina flogleið út í heim, og við hesum latið upp enn ein marknað hjá ferðavinnuni. Nýggja rutan til Stokkhólm gevur Føroyum beinleiðis samband til fólkaríkasta landið í Norðurlondum, og til ein høvuðsstað, sum hevur nógv at bjóða, bæði handilsliga og mentanarliga.

Eg vænti, at føroyska ferðavinnan sær hetta sum ein eyðsýndan møguleika at fáa sviar at vitja okkum. Tað, sum eg kenni til fólkið í Svøríki, eru tey forvitin eftir at læra meira um Føroyar, og eg ivist ikki í, at áhugi er fyri at vitja verður stórur, fáa tey møguleikan at kunna seg við tað, vit hava at bjóða. Við miðvísari marknaðarføring kann hetta sum frá líður gerast ein av okkara stóru ferðavinnumarknaðum.

Men sambandið millum Føroyar og Stokkhólm letur eisini upp fyri tættari samstarvi á øðrum vinnuøkjum. Svenski marknaðurin er - við sínum 9 milliónum brúkarum – ein sera áhugaverdur grannamarknaður. Her eru góðir møguleikar at útbyggja okkara útflutning av føroyskum vørum og tænastum, umframt at byggja tættari sambond og samstarv við sviar.

Tí skal tað vera mín vón, at vit síggja og nýta møguleikarnar, so henda flogrutan verður ment til eitt fast samband.

Flogleiðin Vágar-Arlanda vísir enn einaferð týdningin av at hava eitt flogfelag, sum hevur Føroyar sum miðstøð. Atlantsflog flýgur nú til øll Norðurlond - Finnland og Áland undantikin. Tað hevði neyvan nakar væntað fyri 20 árum síðani, tá fyrsta flogfarið fleyg á føroyskum veingjum.

Týdningurin av góðum flutnings- og samskiftismøguleikum fyri trivnaðin hjá okkum, sum her búgva, og fyri menningina av landi okkara, kann illa metast ov høgt. Tað, at nýggjar rutur, sum hendan til Stokkhólm, verða settar á stovn, er við til at staðfesta, at tað ber til at búgva í Føroyum og samstundis verða samansjóðaður við umheimin.

Eg fari at ynskja Atlantsflogi og øllum føroyingum hjartaliga tillukku við Svøríkisleiðini, og vóni, at felagið fer at halda fram at vísa dirvi og áræði at útbyggja okkara loftveganet, sum ein avgerandi liður í tí at flyta land okkara framá.

**Bjørt Samuelsen**
**landsstýriskvinna**